Viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 92/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tíðaravmarkað avgjald á ferðandi við komu til Føroya (Leingjan av tíðarskeiðnum, ið ferðandi skulu rinda avgjald við komu til Føroya)

Sum avtalað á Fíggjarnevndarfundi í gjár fari eg at mæla Fíggjarnevndini til at gera tvær smærri broytingar í lógaruppskotinum:

Uppskot til orðing av broytingaruppskoti:

Í § 1, nr. 1 verður "1. oktober til og við 31. desember 2021" broytt til: "1. oktober 2020 til og við 31. desember 2021".

Í § 1, nr. 2 verður "og fer úr gildi 1. januar 2022" broytt til: "og fer úr gildi 1. apríl 2022".

Viðmerkingar:

Fyri at eingin ivi skal vera um, at heimild er at uppkrevja avgjald við komu til Føroya árið út verður nágreinað í lógartekstinum, at tað er 1. oktober 2020 sipað verður til í § 1, nr. 1.

Samstundis verður mælt til, at løgtingslógin verður sett úr gildi 1. apríl 2022 í staðin fyri 1. januar 2022. Hetta verður gjørt fyri at geva TAKS eitt sindur longri skotbrá at innheinta møguligar eftirstøður við panting.

Tinganes, tann 9. mars 2021

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður í fíggjarmálum